LM-098/2020

Fylgiskjal 3

Landsbanki Føroya

Til Fíggjarmálaráðið

Tórshavn, 15 februar 2021

LÓGARUPPSKOT UM LANDSBANKAN OG LOGARUPPSKOT UM BÚSKAPARRÁÐ

Landsbankin skilur, at ein politisk avgerð er tikin um broytingar í Landsbankanum og Búskaparráðnum, og ynskir í hesum sambandi at vísa á, at broytingarnar kunnu hava nakrar óhepnar avleiðingar við sær. Serliga at broytingarnar ganga út yvir óhefni hjá stovnunum.

Hjálagt er hoyringarsvar frá Landsbankanum til lógaruppskot um Landsbankan og lógaruppskot um Búskaparráð.

Vinaliga

Landsbankin

Tórshavn 15.02.21

Búskaparráðið og Landsbankin

	Tann nýggja eindin

Uppskot til loysn	Uppskot til tillagan av ætlaðu broytingunum, um tær verða settar í verk:
	
	• Samanlagdi stovnurin leggur dent á sítt politiska óheftni við at tað
	  o í lógaruppskotinum um landsbankan §2, stk.2, verður lagt afturat, at nevndarlimirnir verða valdir eftir tilmæli frá stovnum/feløgum/hægri læristovni, sum frammanundan eru defineraði.
	  o í lógaruppskotinum um landsbankan verður §18 aftur sett inn
	
	• Samanlagdi stovnurin lækkar samlaða talið av limum at sita í nevndini frá 10 (7+3) til 5.
	  o Tað skal greitt framganga, at broytingin hevur við sær eina kostnaðarsparing av nevndarsamsýningum, og at nýggja nevndin eftirfylgjandi fer at avgera, hvussu fyrisitingin í nýggja samanlagda stovninum mest skynsamt verður skipað.

Uppskotið til loysn omanfyri byggir á niðanfyri standandi greining av uppgávunum hjá Landsbankanum, Búskaparráðnum og Váðaránum, umframt refleksjónir um politiska óheftnið, fakligu førleikarnar og menning av teimum, umframt møguleikarnar at effektivisera.

Øki	Búskaparráðið (BR)	Landsbankin (LB)	Váðaráðið (VR)
Uppgáva í dag	• Fylgja við í føroyska búskapinum (realbúskaparligt sjónarhorn) • Framleiða tvær konjunkturfrágreiðingar árliga; 1. mars og 1.sep. • Kann gera temafrágreiðingar • Ráðgeva landsstyrið (eftir tørvi) • Luttaka í samfelagskjaki • Virka óheft av politisku skipanini	• Hava eftirlit við og gera váðametingar um fíggjarliga støðufestið í føroyska fíggjargeiranum, undir hesum: • Hava eftirlit við, meta um og umsita gjaldføri landsins • Umsita landsins skuld, lántøku, og samskifti við Moody's. • Framleiða greiningar av fíggjarliga støðufestinum • Luttaka í samfelagskjakinum • Virka óheft av politisku skipanini	• Hava eftirlit við systemiskum váðum og staðfesta systemiskar váðar við støði í greiningum • Luttaka í samfelagskjakinum • Virka óheft av politisku skipanini

Øki	Sammenlogd eind BR og LB
Yvirskipað um samanleggingina	• Nevndin í Landsbankanum er Búskaparráðið • Nevndin hevur 3 nevndarlimir • Landsbankin er skrivstova og fyrisiting hjá landsbankanevndini, Búskaparáðnum og Váðaráðnum • Nøvnini Landsbanki Føroya, Búskaparráðið og Føroya Váðaráð verða varðveitt í samanløgdu eindini • Lógargrundarlagið hjá Váðaránum er óbroytt

Politiskt óheftni	• Í samanløgdu eindini av Búskaparráðnum og Landsbankanum stendur tað framvegis í lógini um Búskaparráð, §1 og í lógini um Landsbankan, §1, stk. 2, at hesi skulu veita óhefta ráðgeving og virka óheft av politisku skipanini
	• ... tó verður politiska óheftnið ógildað, tí
	  ○ Fíggjarmálaráðharrin einsamallur velur teir 3 limirnar í nevndina sambært § 2, stk. 2 í lógaruppskotinum um Landsbankan
	  ○ Búskaparráðið og Landsbankin verða frameftir beinleiðis á rakstrarjáttan hjá Fíggjarmálaráðnum. Lógargrundarlagið hjá Landsbankanum, ið tryggjar armslongd frá politisku skipanini sambært §2 stk.2, og §18, stk.2&3 og §17, verður strikað
	
	• Styrkir og veikleikar við einum politiskt stýrdum stovni
	  ○ <u>Styrki</u>:
	  ▪ Tryggjar at politiska kósin hjá tí demokratiskt valda landsstýrinum verður framd/stuðlað
	  ○ <u>Veikleikar</u>:
	  ▪ Fakligheit vil ikki altíð virka hond í hond við politiska viljanum
	  ▪ Ratingfeløg og aðrir útlendskir myndugleikar kunnu fara at ivast um avgerðir tiknar av, og ráðgeving givin frá Landsbankanum og Búskaparráðnum, eftirsum spurningur kann setast við, hvørt Landsbankin og Búskaparráðið frítt kunnu úttala seg um tann til ein og hvørja tíð førda fíggjarpolitikkin í Føroyum, ella ikki.
	  ▪ Fólkaræðisliga er tað óheppið, at Landsbankin og Búskaparráðið verða so mikið tætt knýtt at sitandi landsstýri, tí tað er ivasamt um almenningurin og andstøðan fer at hava atgongd til nøktandi og álítandi kunning og fakliga ráðgeving.

Fagligu førleikarnir fevna um	• Landsbankin savnar seg um fíggjarliga støðufestið í Føroyum og landsins skuld, gjaldføri og lántøku. • Búskaparráðið savnar seg um konjunktur- og temafrágreiðingum um realbúskapin. • Í nýggja lógaruppskotinum skal samanlagdi stovnurin hava fakligu førleikarnar at røkja omanfyristandandi uppgávurnar hjá bæði Landsbankanum og Búskaparráðnum, og nevndin, ið er 3 limir, skal tryggja at øll fakligu økini verða røkt.

	• Hvat eru styrkirnar og veikleikarnir við at leggja saman fakligu økini hjá Landsbankanum og Búskaparráðnum í sama stovn: o Styrkir: ▪ Byggir upp fakliga sterkt umhvørvi í sama stovni o Veikleikar: ▪ Stovnurin, ið nú verður lagdur beinleiðis undir rakstrarjáttan frá FMR, verður til eina og hvørja tíð bundin at tí játtan, sum verður samtykt á fíggjarlógini á hvørjum ári, og kann tí verða ávirkað av politiskari raðfesting. ▪ Tað, at greining og faklig ráðgeving verður avmarkað til ein stovn, avmarkar møguleikan at trekkja uppá íkast, ráðgeving og konstruktivan kritikk frá øðrum fakpersónum/stovnum, samstundis sum tað fer at minka um stimbranina av fakligari menning (á til dømis setrinum og øðrum viðkomandi lærustovnum, har vitan um búskapin verður ment,) umframt professionalitetin. ▪ Arbeiðsuppgávurnar hjá nevndini fara at seta stór faklig krøv til tey, ið skullu manna sessirnar, eftirsum tað verða hesi, ið væntast at skula luttaka í samfelagskjakinum. Nevndarfundirnir mugu sostatt leggjast til rættis soleiðis, at realbúskaparlig viðurskifti verða viðgjørd og umrøtt í hóskandi mun, sum uppgávurnar hjá Landsbankanum, ið snúgva seg um eitt nú skuld, gjaldføri, kredittmeting, íløgurøkt og lántøku hjá landinum.
Effektivisering	• Nevndin í Landsbankanum kann minkast frá 7 til 3 limir uttan trupulleikar, tá verður spart umleið 300.000 kr. árliga. • Verður nevndin í Landsbankanum samstundis Búskaparráð, verður spart 200.000 árliga afturat. • Soleiðis verður samanlagt spart nærum 500.000 kr. í nevndarsamsýningum. • Hinvegin, so er neyðugt at seta fleiri starvsfólk í samanlagda stovninum, um núverandi uppgávur, skrivaraarbeiði og fyrisiting hjá Landsbankanum og Búskaparráðnum tilsamans skulu røkjast á sama tænastustøði sum í dag. Hetta fer at hava við sær øktar rakstrarútreiðslur hjá stovninum. Í lógaruppskotinum verður sipað til, at umsitingin skal effektiviserast, uttan tað er nágreinað, hvussu hesar effektiviseringar skulu fremjast ella, hvussu nógv skal sparast. Rakstrarútreiðslurnar hjá Búskaparráðnum eru í dag um 800.000 kr. tá nevndarsamsýningarnar ikki vera roknaðar við. • Sparingin við at leggja Landsbankan og Búskaparráðið saman er sostatt mett at vera avmarkað. • Ein nærri lýsing av hvørjar ætlanir og mál, sum eru sett fyri samanlagda stovnin manglar. (Hvør er ambitiónin við samanlagda stovninum) Hetta er avgerandi fyri at kunna meta um, hvussu nógv fíggjarorka krevst fyri at tryggja at uppgávurnar, ið væntast at verða loystar, eisini verða latnar.